SUNDA KOMMUNA

## Lærarastarv í Norðskála-Oyrar skúla

**Ein av lærarum okkara fer í farloyvi í januar. Vit søkja tí:**

1 lærara í tíðaravmarkað starv í tíðarskeiðnum 1. januar til 30. juni 2009

Søkt verður eftir lærarum, sum undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans duga at samstarva og eru fyrikomandi eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum eru stundisligir og nærlagdir

**Starvið inniber hesi øki:**
- Rokning í 2. flokki
- Náttúru og tøkni
- Handaverk/List
- Ítrótt/svimjing við yngru flokkunum
- Flokslærari
- Bókasavnið

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í lærarastarvið, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum. Onnur eru eisini vælkomin at søkja.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1-29.2

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera 1. læraranum í hendi í seinasta lagi 15. des. 2008 kl. 10.00.

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla Jákup Joensen, 1. lærara, á tlf. 737248 ella 737249 . Eisini ber til at senda teldupost til 1. læraran: oli.jakup.joensen@skulin.fo

Norðskála-Oyrar skúli hevur 75 næmingar í 5 flokkum. Við skúlan starvast 8 lærarar, 1 stuðul, og reingerðingarfólk.

Vit arbeiða alsamt við menning skúlans. Í ár arbeiða vit við at innføra lærustrategiir á øllum floksstigum.

Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.skular.sunda.fo

Norðskála-Oyrar skúli
Postboks 39
FO-400 Oyrarbakki
Tlf. 737249

## Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**

# Barnaverndartænastan

fyri: Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur

## Stuðulsfólk til Barnaverndartænastuna

**Fyri: Sørvágs,- Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur**

Barnaverndartænastan søkir eftir fólki at arbeiða sum stuðul hjá børnum við serligum tørvi.

Børnini hava ymiskar trupulleikar og/ella liva undir umstøðum sum gera, at tey hava tørv á hjálp í heiminum, ella uttanfyri heimið.

Stuðulin skal verða við til at gera umstøðurnar hjá barninum/familjuni so góðar, sum tilber, so barnið kann mennast á ein fullgóðan hátt.

Stuðulin kemur arbeiða tætt saman við familjuni.

Tað er týdningarmikið, at stuðulin dugir at tillaga seg, samstarva, er opin, jaligur, og hevur tol.

Stuðulin má duga at síggja møguleikar fram um mørk, so børnini/familjan fær avbjóðingar í gerandisdegnum.

Ynskiligt er, at tey, ið sett verða hava hóskandi fakliga útbúgving og royndir innan mennandi arbeiði við børnum t.d.. námsfrøðingar, lærarar, ergoterapeutar, e.l., men fólk við aðrari viðkomandi útbúgving eru eisini vælkomin at søkja.

Arbeiðið verður skipað í samráð við Barnaverndartænastuna og fakfólk innan økið.

Talan um 2. størv, ið fevna ávíkavist um uml. 35. og 20. tímar um vikuna, og verða at seta skjótast tilber.

Lønar, og setunarviðurskifti eru sambært galdandi reglum.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 22.12.08 kl. 12.00, og skulu stílast til:

Barnaverndartænastan
Hammersheimbsvegur 1
Postboks 19
FO-360 Sandavágur
ATT.: Jóngerð Nielsen

Nærri upplýsingar um størvini fáast á tlf.: 333960 frá

Jóngerð Nielsen, leiðara, ella Jan Terje Simonsen, málsviðgeri, allar gerandisdagar millum kl.10.00-16.00.

Hammershaimbsvegur 1 • Postrúm 19 • 360 Sandavágur
Tlf. 333 960 • Fartlf. 213 960 • E-mail bvt@sandavagur.fo

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

| | |
|---|---|
| Opið er: | Børkuvegur |
| mánadag-hósdag frá kl. 9-16 | 620 Runavík |
| fríggjadag frá kl. 9-12 | Tlf. 448480 |

Lesið Sosialin -so eru tit við!

EYSTURSKÚLIN TÓRSHAVN

# Starv sum stuðul í Eysturskúlanum

Eysturskúlin søkir eftir stuðli til næming við serligum tørvi at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 5. januar 2009 og fyribils til 30. apríl 2009

Fyrimun hevur umsøkjari við royndum í mennandi stuðulsarbeiði og viðkomandi útbúgving.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Í Eysturskúlanum leggja vit dent á:**
- Í undirvísingini at taka støði í teimum mongu førleikunum
- At leita eftir sterkum síðum hjá næminginum
- At tollyndi skal verða grundleggjandi fyri alt okkara virksemi

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 19. desember 2008 á middegi.

Meira fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við skúlastjóran, Eyðdis Eidesgaard á tlf. 302540 ella 214752

**Eysturskúlin**
**Tórgarðsgøta 17**
**100 Tórshavn**

GISTING V/MORGUNMATI · SKEIÐ · FUNDARVIRKSEMI




Tel. 238877 · info@hotelrunavik.fo · www.hotelrunavik.fo

# Frá Føroya Fiskimannafelag

Uppskot, sum skulu leggjast fram á Landsfundinum 29. des., skulu vera okkum í hendi innan 15. des.

Føroya Fiskimannafelag